## DAGSINS MEINING

# Persónsmál?

Tað vísir seg, at hvørja ferð okkurt er á vási við teimum landsstýrisfólkum, ið leiðsla Tjóðveldisfloksins hevur útnevnt, so fáa fjølmiðlarnir ábreiðslur fyri at fokusera uppá persónsmál.

Formaður Tjóðveldisfloksins skal hava púra rætt í, at persónsmál ikki eiga at fylla dagskránna, tá um føroyskar politikarar ræður.

Hvat er eitt persónsmál? Um onkur politikari til dømis hevur onkran fult lógligan, men kanska eitt sindur óhepnan óvana, ið hann dyrkar í síni frítíð, so er talan um eitt persónsmál, ið sjálvandi ikki skal fylla miðlarnar. Um onkur politikari í síni frítíð ella í sínum borgarliga starvi ger okkurt óheppið, ið einki hevur við politska arbeiðið at gera, men ikki er kriminelt, so er eisini talan um persónsmál, ið sjálvandi ikki skulu fylla miðlarnar ella blandast uppí politisk mál.

Verður ein politikari ákærdur eftir revsilógini, so er talan um ein politiskan trúvirðistrupulleika og ikki persónsmál.

Um ein politikari ber seg skeivt at í starvsetanarmálum, sum til dømis Annlis Bjarkhamar gjørdi, ella sigur ósatt alment og tveitur fólk út av fundum, sum eitt nú Tórbjørn Jacobsen gjørdi, so er ikki talan um persónsmál, men um ein trupulleika hjá viðkomandi politikara og teimum, ið hann samstarvar við og flokkin, ið viðkomandi umboðar.

Um ein landsstýrismaður í sínum starvsdegi hóttir fólk ella tíggjar sær illa yvirfyri starvsfólki, so er talan ikki um eitt persónsmál. Ein landsstýrismaður hevur stórt vald, og umráðandi er, at borgarar kunnu kenna seg tryggar við hetta. Malplaserað skemt ella hóttanir hoyra ikki heima í starvsdegnum hjá einum landstýrismanni. Hvussu landsstýrismaðurin skemtar í frítíðini heima hjá sær sjálvum er sjálvsagt ikki eitt mál, ið fjølmiðlarnir skulu befatta seg við, men um tingmenn og onnur kenna seg hótt, so er talan um eitt mál, ið eigur at takast upp politiskt.

Formaður Tjóðveldisfloksins hevur aftur púra beint, tá hann sigur, at avrik og ikki persónsmál eiga at verða tað, ið ein flokkur skal dømast eftir. Avrik á sjálvstýrisleið hava ikki verið nógv, hóast gangur hevur verið nógvur. Tað má hinvegin sigast at verða eitt avrik í sær sjálvum, at fleiri av landsstýrisfólkunum, ið eru útnevnd í formanstíðini hjá núverandi formanni Tjóðveldisfloksins, eru farin frá av at hava framt mistøk í sínum landsstýrissessi. Eisini er tað merkisvert í sær sjálvum, at man tvíheldur um tey, ið hava framt mistøk, men tveitti Signar á Brúnni, ið einki skeivt hevði gjørt, til hús.

Tjóðveldisfólk eru ikki øll líka fegin um landsstýrisfólkið, ið Tjóðveldisleiðslan hevur valt seinastu árini. Tosið hjá Høgna Hoydal, um at fjølmiðlarnir fokusera uppá persónsmál í samband við atburðin hjá Pálli á Reynatúgvu, ljóðar heldur tómligt, eftir at ikki bara eitt, men tvey landsstýrisfólk hjá Tjóðveldisflokkinum, Torbjørn Jacobsen og Annlis Bjarkhamar, noyddust frá, ikki av persónsmálum, men av skeivum atburði í sínum sessi. Hvussu er við dømikraftini hjá leiðslu Tjóðveldisfloksins?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Viðmerking frá Javnaðarflokkinum um sáttmálasamráðingarnar:

# Karsten millum partarnar?

**Føroya Javnaðarflokkur**
*starvsnevndin*



**Tað er uppílegging á arbeiðsgevarasíðu, tá Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, nú kennir tað sum sína skyldu at boða frá, at hann ætlar sær at ógylda undirskrivaðan sáttmála millum maskinmeistarafelagið og SEV.**

Meðan øll arbeiðarafeløgini í landinum og arbeiðsgevarafelagið sita hjá semingsstovninum og royna at finna semju um ein nýggjan sáttmála, kemur landsstýrimaðurin í fíggjarmálum nú sum ketta upp úr høvdatrogi og boðar frá, at hann ætlar at ógylda ein sáttmála, sum Maskinmeistarafelagið og SEV longu hava undirskrivað.

Við hesum leggur landsstýrismaðurin seg beinleiðis uppí samráðingarnar og stuðlar arbeiðsgevara-síðuni. Tí sjálvandi eru aðrir sáttmálar, sum júst eru gjørdir, partur av samráðingunum. Ikki minst Karsten Hansen hevur so mangan lagt dent á, at tá ein sáttmáli er gjørdur, er støðið lagt. Arbeiðarafeløgini hava heldur ikki dult, at sáttmálin millum maskinmeistarafelagið og SEV hevur ávirkað lønarkravið til hesar sáttmálasamráðingar.

**Bluffar Karsten?**
Maskinmeistararnir hjá SEV hava longu fingið útgjøld eftir nýggja sáttmálanum, uttan at landsstýrismaðurin hevur lagt seg út í tað. Men knappliga – beint tá semingsroyndirnar skulu byrja – ger landsstýrismaðurin vart við seg. Og hann ger vart við seg í fjølmiðlunum. Onki hevur verið at hoyrt um at landsstýrismaðurin hevur tikið stig ímóti SEV, fyri at forða fyri at sáttmálin fer at virka. Tað kann verða, at landsstýrismaðurin, áðrenn sáttmálin bleiv gjørdur, hevur sagt SEV frá, at hann ikki tekur undir við semjuni, men enn hevur hann so onki ítøkiligt gjørt.

Tað er eisini ilt at síggja, hvussu landsstýrismaðurin nú skal kunna ógylda undirskrivaða sáttmálan, uttan at tað fær álvarsligar avleiðingar fyri allan arbeiðsmarknaðin og komandi samráðingar.

Men tó fer hann í fjølmiðlarnar við síni fráboðan. Vit ivast ikki í, at henda kunngerð frá landsstýrismanninum bert hevur til endamáls at stuðla arbeiðsgevarsíðuni í sáttmálasamráðingunum. Landsstýrið hevur havt ríkiligar stundir at taka stig ímóti SEV, áðrenn semingsstovnurin kom uppí samráðingarnar, Júst nú, tá støðan er so viðbrekin, átti landsstýrið at tagt. Javnaðarflokkurin mælir landsstýrinum til at halda fingrarnar burtur og virða rættin hjá arbeiðarafeløgunum, at samráða seg til ein góðan sáttmála.

# Grunnurin Nuuk-Reykjavík-Tórshavn

TÍÐINDASKRIV

Býráðið lýsir einaferð um árið, nær stuðul verður latin úr grunninum til frama fyri samstarvi og fatan millum borgararnar og kommunustýrini í Nuuk, Reykjavík og Tórshavn.

Endamálið við grunninum er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella starvsemi, ið kunnu menna samstarvið millum kommunurnar.

Stuðul uppá umleið kr. 300.000,00 kann verða latin einaferð um árið, og kommunurnar taka á felagsfundi avgerð um, hvør skal hava hann.

Í ár verður fundurin í juni mánað í Reykjavík.

Í 2002 vóru seks umsóknir úr Tórshavn, fýra úr Nuuk og níggju úr Reykjavíkar, og fingu hesi stuðul úr grunninum:

3a á Argja skúla fekk kr. 10.000,00 til Íslandsferð í sambandi við verkætlan.

Føroya Handilsskúla fekk kr. 25.000,00 til ferðaútreiðslur til Nuuk í sambandi við verkætlan.

Katrin G. Isfeld, lærara-lesandi, fekk kr. 10.000,00 í sambandi við starvsvenjing í Grønlandi.

Hondbóltssambandið Føroya fekk kr. 10.000,00 til venjingarlegu í Reykjavík hjá A-landsliðnum hjá monnum.

"Katuaq" grønlendska mentunarhúsið fekk kr. 33.800,00 til felags verkætlan um Grønland-Ísland-Føroyar "På godt og ondt".

Dúi J. Landmark fekk kr. 56.000,00 til dokumentarfilmin "Et løb imod nord".

Reynir Adólfsson fekk kr. 22.000,00 til hondverkaraframsýningina "Vestnorden Craft Show".

Gunnar þorláksson fekk kr. 22.000,00 til "Nordisk glæde-Ny livsstil".


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Sjálvstýrisflokkurin og sáttmálasamráðingar

Til:
**Føroya Arbeiðarafelag**
**Havnar**
**Arbeiðsmannafelag,**
**Havnar**
**Arbeiðskvinnufelag**
**Klaksvíkar**
**Arbeiðsmannafelag**
**Klaksvíkar**
**Arbeiðskvinnufelag**



Undirritaði váttar hervið, at Sjálvstýrisflokkurin hevur móttikið mótmælisskriv tykkara dagfest 6/5-2003.

Kartin Hansen landsstýrismaður í fíggjarmálum skal eftir galdandi lógum og viðtøkum góðkenna sáttmálan millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Sambært tíðindunum í Útvarp Føroya í morgun sigur John Danielsen, at landsstýrismaðurin hevði boðað leiðsluni í SEV frá, at sáttmálin ikki fór at verða góðkendur. Hóast hesa fráboðan bleiv sáttmálin undirskrivaður.

Eftir tí sum fram er komið, eru lønarkrøvini sum fakfeløgini hava sett, grundað í lønarhækkingini í áðurnevnda sáttmála. Undirritaði má geva fakfeløgunum rætt í tí, at tað er sera óheppið at politiska fráboðanin ikki kemur alment fram fyrr enn nú.

Sjálvstýrisflokkurin ynskir ikki at gerast partur í sáttmálatrætu á arbeiðsmarknaðinum nevnliga tí, at tað í demokratiskum londum er ein grundleggjandi rættur hjá fakfeløgunum, frítt at samráðast um setanar og lønarviðurskiftini hjá limunum í feløgunum.

Arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag skulu uttan politiska uppílegging samráðast og undirskriva ein sáttmála, sum báðir partar kunnu liva við.

**Hetta ynskir og virðir Sjálvstýrisflokkurin.**

Vinarlig heilsan
**f/ Sjálvstýrisflokkin**
**Kári P. Højgaard,**
**formaður**

# Nú er ikki nógv at siga NI fyri

**Sonja F. Mørkøre**

Eg sat her á flatlondum og fylgdi valinum um kommunusamanlegging í Sundalagnum. Sjálvt um eg ikki havi havt bústað í Hósvík í nógv ár, havi eg tó mínar røtur í Hósvík og fylgi við áhuga tí, ið hendir í heimbygd míni. Eg var fyri at siga tað pent sjokerað yvir úrslitið: NEI. Sum tann einasta kommunan, var tað Hósvíkin, sum segði nei. Sig mær hvat í allari víðu verð hugsa tit fyri tykkum? Ella rættari spurt: hugsa tit? Hvussu ætla tit at klára tykkum sum ein lítil "Palle alene i verden" uttan fyri alt og øll? Hvat við útbygging av skúlanum, betran av ansingarplássum til børnini os.fr. Halda tit virkuliga, at tit klára alt uttan samstarv við hinar kommurnar? Tit mugu rokna við, at hinar kommunurnar ikki eru sinnaðar í at hava tað stóra samtarvið við tykkum, tá tit nú hava meldað tykkum úr felagsskapinum.

Tað hevur verið attraktivt hjá barnafamiljum at flyta til Hósvíkar, tí bygdin liggur so centralt, og tað er skjótt at koyra til Havnar. Hvør tímir nú at flyta til eina bygd, sum siglir sín egna sjógv og sum hevur stórar uppgávur fyri framman? Dagrøktin klárar illa at fylgja við barnavøkstrinum, skúlin nøktar ikki nútíðarinnar tørv, og nógv eru børnini undir skúlaaldur. Hvat nú um/tá eldraøkið verður lagt út á kommunurnar? Hvar fáa tit pengarnar frá?

Tað ringasta av øllum er, at eg trúgvi ikki, at tit, sum hava atkvøtt nei, hava hugsað framm í tíðina. Ístaðin hava tit hugt aftur í tíðina og lurta eftir teimum gomlu negativu og ókonstruktivu bygdarfólkunum, sum liva í 1950'unum (ella nær tað var), tá Hósvíkin sleit seg leysa frá Hvalvíkini. Hetta gamla bygdaklandrið sum eg og onnur við mær bara hava grinið at. Eg trúði also, at hetta bygdarsliga snævurskygni var farið í ommu sína, men tað sær ikki soleiðis út.

Summi vilja verða við at Hósvíkin er Føroya nalvi, tí hon liggur so centralt. Sum úrslitið hevur víst seg í kvøld, kann eg ikki lata verða við at hugsa um barnabókina "nalvi frammfan, prumpur aftan". Við at seta nei á atkvøðingarseðlin hava nei-sigaranir kúvent frá at verða ein centralur nalvi til at vera ein prumpur aftan. Eitt lítið hol, ið liggur goymt og krógvað einsamalt í tí svarta myrkrinum.

Hósvíkingar hava ofta borið orð fyri at vera tvørir, hesum brekinum kann eg sjálv ikki fullkomiliga siga meg fría fyri at hava; men at meirlutin av hósvíkingum eisini stóðu so aftarliga í køini, tá Várharra lutaði út vit og skil, sum úrslitið í kvøld vísti, visti eg ikki.

# Ferðist í Føroyum

TÍÐINDASKRIV

Hevur tú verið í Mykinesi og/ella til Føroysk kvøld á Hotel Vágum? Hevur tú sæð Enniberg? Kennir tú Havnina? - og hvat við at ríða til Leynar? Ella hvat við einum kampingtúri á Munkinum?

Hesar og fleiri aðrir spurningar verða settir í faldaranum sum Ferðaráð Føroya hevur borið út til øll húski í landinum. Hetta er ein roynd at vekja hugin hjá føroyingum at ferðast í egnum landi. Tað er ikki neyðugt at fara uttanlands fyri at uppliva nakað. Í Føroyum er nógv spennandi tilboð - tú kanst gista á hotelli, í summarhúsi, fara bátaferðir, gonguferðir ella vitja søvn. Hetta er eins spennandi og tó nógv bíligari enn at fara uttanlanda.

Sum liður í herðferðini at fáa føroyingar at ferðast í Føroyum skipar Ferðaráðið saman við øðrum fyri stórum tiltaki á torginum í SMS frá hósdegnum 8. til leygardagin 10. mei. Her kanst tú kunna teg um allar teir møguleikar tú hevur sum ferðamaður í Føroyum. Umboð fyri økisferðavinnufeløgini (Kunningarstovunar) kring landi verða saman við okkum á torginum.

Norðoya Kunningarstova á torginum hósdag og fríggjadag, Eysturoyar Kunningarstova fríggjadagin, Kunningarstovan í Havn hósdag og leygardag, Vága Kunningarstova fríggjadagin, Sandoyar Kunningarstova leygardagin, Kunningarstovan Suðuroy hósdagin.

Harumframt verður høvið at síggja frumsnið av nýggju skeltunum, og at tosa við Tórálv Weihe, ið hevur staðið fyri skeltis-verkætlanini.

Vit vóna at síggja tykkum til ferðavinnu tiltakið í SMS. Um tit ynskja fleiri upplýsingar ella at gera avtalu vinarliga seti tykkum ísamband við Hildur Durhuus, hildur@tourist.fo ella tel. 31 60 55.





